# »Open by night« á Klaksvíkar bókasavni

Leygardagin 8. december hevur bókasavnið í Klaksvík opið frá klokkan 10 til 22. Umframt at til ber at læna bøkur henda dagin verður eisini ymiskt jólaligt á skránni. Frá klokkan 15 til 18 verður høvi hjá foreldrum og børnum at koma á bókasavnið at klippa jólaprýði og eta piparnøtur. Klokkan 17 kemur jólaomman at vitja, og hon fer at lesa eina jólasøgu fyri børnunum. Klokkan 19 fara næmingar úr Klaksvíkar tónlistaskúla at spæla jólaløg og klokkan 20 fer Bergur Rasmussen at hugleiða um Harry Potter. Alt kvøldið bjóðar bókasavnið kaffi við onkum góðum aftur við.






















